## Tíðindadeildir lagdar saman

Íslendska kringvarpið fremur nú somu bygnaðarbroyting sum tað føroyska, tí í gjár kunngjørdi aðalstjórin, Páll Magnússon, at tíðindadeildirnar hjá útvarpinum og sjónvarpinum eru lagdar saman, og at skipanin kemur í gildi beinanvegin. Samstundis varð fráboðað, at Óðinn Jónsson, sum hevur verið tíðindaleiðari í útvarpinum, skal standa á odda fyri teirri samanløgdu deildini. Um endamálið við at leggja saman segði stjórin, at samanleggingin skal styrkja tíðindatænastuna í útvarpinum, sjónvarpinum og á alnótini.



## Krónan ikki skyldina

Hóast íslendska krónan er viknað munandi teir seinastu mánaðirnar og tykist óstøðug samanborið við onnur gjaldoyru, hava íslendskir útgerðarmenn ongan skund til at fara frá krónuni og at velja annað og tryggari gjaldoyra ístaðin fyri. Talsmaðurin hjá útgerðarmonnunum, Friðrik J. Arngrímsson, sigur við bløðini, at væl er krónan óstøðug, men tað er kortini ikki hennara skyld, at íslendski búskapurin er so ótryggur. Tann frágreiðingin liggur hjá teimum, sum stýra peningaviðurskiftunum, sigur hann.

# va við sær sjálvum

Tað er løgmaður, ið varðar av ognunum í Tinganesi. Hetta merkir, at tað er hann, ið stendur fyri og skipar hølisnýtsluna.

Eg havi í góðari tíð sagt tær, at vit máttu finna hóskandi høli til Petur Petersen. Tá eingin loysn varð funnin, havi eg fráboðað tær avgerð mína. Henda avgerð stendur við.

Fortreytirnar fyri avtaluni frá februar um fyribils hølisnýtslu eru av givnum orsøkum burtur.

Eg eri fúsur at skipa so fyri, at víst verður á skrivstovur í Tinganesi, sum uttanríkisráðið sum eina fyribilsloysn kann nýta.

Í løtuni verður arbeitt við at finna eina langtíðarloysn fyri ráðini, sum í dag eru í Tinganesi. Eitt av ráðunum verður at flyta úr Tinganesi. Tað vendi eg aftur til.

Sama dag, tann 4. september, svarar Høgni Hoydal løgmanni aftur.

**Góði Jóannes**

Takk fyri svarið, sum eg nústaðni havi sæð, tí eg havi pakkað telduna saman í gjár, tá eg tømdi skrivstovuna hjá mær, og eri farin á netið heimanífrá.

Eg havi sum áður nevnt ongan trupulleika av at fáa staðfest heilt aðrar loysnir ella umbøn um at vit fara heilt út ella sita hvar sum helst. Bara vit fáa lagt greitt, hvør grundgevingin er, og hvussu til ber at samstarva og samskifta millum ráðini uttan hesar persónsog valdskonfliktir.

Havi bara ikki orð fyri, hvussu vónsvikin eg eri av, at slíkt sum hetta kann henda - og tað er ótrúligt, at tað ikki skal bera til at fáa tingini at rigga á tí praktiska planinum. Her liggur annað handan skræðuna, og tað er tað, sum eg haldi vit hava skyldu at gera nakað við, tí tað oyðileggur politiska arbeiðið og samstarv millum embætisfólkini.

Eg havi frá byrjan av sagt, tá tú hevur spurt um hølir:

- Sjálvandi vil eg fegin finna loysnir, men eg havi onki pláss at vísa á - tvørturímóti havi eg onki pláss til høgt sett embætisfólk, meðan hølir annars standa tóm í Skansapakkhúsinum.

- Tað eiga at vera stjórarnir, ið standa fyri øllum slíkum praktiskum spurningum og teir mugu samskifta og samráðast um loysnir.

- Um okkurt politiskt liggur aftanfyri umbønina um hølir, so vil eg fegin lata mína skrivstovu til tað og fara í eitthvørt tømt høli, so vit ikki skapa órógv millum starvsfólkini. Og undir øllum umstøðum er jú talan um interimistiska loysn.

Eg havi sum fráboðað tikið avgerð um, at eg noyðist at rætta ta skeivu hendingina, sum hevur sett eitt starvsfólk út, ið onki hevur við hetta mál at gera, hóast aðrar og minst líka góðar hølisloysnir eru klárar og settar fram til nýtslu.

Annars kann eg ikki liva við mær sjálvum. Kenni meg niðurgjørdan og traðkaðan á - og kann ikki góðtaka ta vantandi virðingina, ið eg havi kent í hesum støðum, tá praktisk viðurskifti og arbeiðsbýti millum ráðini hava verið á skrá.

Kenni meg sum ein óvælkomnan gest í Tinganesi, og kenni meg eyðmerktan sum eitt slag av geykaunga, ið tekur búgv í reiðrinum hjá øðrum og roynir at skúgva „veruligu" ungarnar til viks.

Sum formaður í størsta flokki á tingi og samgonguflokki, vil eg ikki finna meg í at verða tosaður til sum ein óargaligur skúladrongur og fáa munnligar skorfleingjur meðan starvsfólk hoyra - og enntá frá embætisfólki (og her hugsi eg ikki um hendingina, sum eg tíverri nevndi fyri tær, og har starvsfólkið hevur biðið um umbering, ið eg ikki helt vera neyðuga, tí slíkar reaksjónir eru orsakaðar av absurdum støðum millum starvsfólkini).

Yvirhøvur haldi eg tað vera óhoyrt, at rætturin til landsins ognir og umsitingarfæ verður settur upp sum nakað, ið eg skal biða um ella góðtaka boð um - og har eg skal kenna øsing og orðsettan ótta fyri, at eg vil gera meg inn á nakran ella vil taka nakað frá nøkrum.

Soleiðis kendi eg tað, tá starvsfólkabýtið skuldi gerast, tá málsøkjabýtið skuldi staðfestast, tá fíggjarlógin skuldi gerast - og so aftur nú - eftir eitt annars eftir mínum tykki gott tíðarskeið í samstarvinum okkara millum síðani í summar.

Avgerðin um at stovna Uttanríkisráð er ein undirskrivað politisk avtala og er ásett í málsøkjakunngerð og fíggjarlóg. Tað merkir, at øll fyrisitingin skal virða hesa avgerð og virka fyri, at avgerðin kann útinnast í verki - uttan at vit skulu berjast fyri at vera til.

Hetta er eftir mínum tykki eisini uppgávan hjá løgmanni og hansara fyrisiting - og skyldan hjá eini miðfyrisiting, sum hevur orðað nøkur mál, sum eg havi sera ilt við at síggja nakað aftur av, í tí, sum eg havi upplivað higartil í hesum tvístøðum um hølir og mál og samstarv.

Eg vil minna á, at hølistrupulleikarnir eru ein bráðfeingistrupulleiki hjá Uttanríkisráðnum, har eg ikki havi nakað pláss at vísa á til míni starvsfólk. Samstundis vil eg minna á, at avtalan um hølisviðurskifti og starvsfólkabýti frá februar var als ikki úrslit av mínum ynskjum, tí eg vildi frá fyrsta degi fegin nýta loftið í Skansapakkhúsinum, til ein varandi loysn varð funnin. Og tað undrar meg stórliga, at avtalan ongantíð hevur verið hildin og nú verður søgd upp uttan grundgeving.

Fari at spyrja, um eg skal tulka tað soleiðis, at avtalan um starvsfólk heldur ikki er galdandi?

Í dag havi eg, sum tú helst veitst, tosað við embætisfólkini á Løgmansskrivstovuni. Har appelleraði eg staðiliga til, at vit í friðarligheit rættaðu hendingina, sum nú elvdi til opið stríð og gjørdi greitt, at eg fegin vil tosa opið um undirliggjandi konfliktirnar og gjarna fari út úr Tinganesi, um tað hjálpir nakað.

Tað var kanska skeivt av mær at fara beinleiðis til tíni starvsfólk, men tá tú ikki vilt tosa við meg um málið, helt eg tað kortini vera rætt. Tey vístu til, at tey máttu boð frá hægri stað, men annars helt eg, at prátið var rímiligt og vísti, at alneyðugt er at tosa um trupulleikarnar opið og at fólk fáa høvi at siga sína erligu hugsan við hvønn annan.

Eg havi givið mínum stjóra boð um at fáa rættað hendingina og at samskifta við stjóran á løgmansskrivstovuni um hetta - og annars at finna varandi loysnir.

Eri farin úr míni skrivstovu, sum eg allatíðina havi bjóðað sum loysn, og siti nú uppi í fundarrúminum.

Fari eftir hetta ikki aftur at gera meg til part av lutum í umsitingarligum og hølisspurningum, uttan tá tað snýr seg um politiskar raðfestingar og fíggjarspurningar.

Haldi, at slíkt eigur at loysast eina og aleina sum sakligt samskifti og samráðing millum stjórar og embætisfólk út frá fyrmlinum:

- Hvør er tørvurin til tess at uppgávurnar verða loystar og starvsfólkameingið fullnýtt og virt?

- Hvat er ynskiligt við atliti til umboðan og uppgávur hjá ráðunum?

- Hvar kann samstarvast um felags funksjónir - og peningur sparast?

**Vinarliga Høgni**

Fríggjamorgunin hendir so aftur tað, at lásið í umrøddu skrivstovu er skift. Eyðun Luid skrivar til Marjuna Hanusardóttir at hann hevur kannað, hvat í er hent við hurðini hjá Peturi Petersen. Sylindarin er boraður út og nýggjur sylindari, sum vit ikki hava lykil til, er ísettur.

\- - - -

Hetta eru tey skjølini, sum eru til taks í málunum.

Kortini skal leggjast afturat, at eitt skjal er eisini sum vísir, at tá ið samgongan varð skipað, varð semja gjørd ímillum Høgna Hoydal, sum tá var landsstýrismaður í uttanríkismálum og Jóannes Eidesgaard, løgmann, um, hvørji høli og hvørji starvsfólk, uttanríkisráðið skuldi hava til taks og eftir tí, er hendan umstrídda skrivstovan ein partur av uttanríkisráðnum.

\- - - -

Umframt hesi skjølini, hevur eisini eitt ávíst sms samskifti verið ímillum Høgna Hoydal og løgmann um málið og tað hevur Høgni Hoydal latið okkum fáa innlit í.

Sambært Høgna Hoydal nevnir løgmaður á leið 10. august, at Petur Petersen skal hava skrivstovuhøli. Høgni Hoydal svaraði, at hann hevði ongi høli, men at hann bjóðaði Peturi Petersen sína egnu skrivstovu.

Løgmaður sms'ar 31. august

"Havi givið LMS (løgmansskrivstovuni, blm) boð um at gera skrivstovuna klára til Petur Petersen. Tað verður tann skrivstovan, sum Bjørn Kunoy var flutt-ur inn í.".

Høgni svarar sama dag

"Nei, tað gongur ikki. Hetta verður reint kríggj millum starvsfólkini, og vit hava Hákun uttan nakra skrivstovu yvirhøvur. Vit mugu finna sakligar loysnir rundan um eitt borð. Petur kann heldur taka mína skrivstovu."

…onki svar

Høgni sms'ar aftur 1. september

"Vit mugu hava ein kreppufund í morgin áðrenn. Hetta kann ongin bjóða fólki. Bjørn farin til hús í dag, Hákun onga skrivstovu, nýtt fólk byrjar fyrsta dagin í UR (uttanríkisráðnum blm) – og Petur drigin inn í eitt stríð, sum ongin skilur. Havi ongantíð verið úti fyri nøkrum líkinandi. Eg veri har út beint eftir 8."

Hetta eru síðstu skjølini, vit hava fingið hendur á í málinum.

Sosialurin í morgin:

## Høgni Hoydal: Løgmaður fór út um mark

\- Tað var ikki eg, ella nakar annar í uttanríkisráðnum, sum breyt inn já løgmanni. Fyrsta innbrotið var á eina skrivstovu hjá uttanríkisráðnum. Tað sigur Høgni Hoydal, fyrrverandi landsstýrismaður um umstríddu skrivstovuna. Vit fingu eina viðmerking frá honum beint fyri døgverða í dag, men tað var so seint, at tað eydnaðist ikki at fáa hana í blaðið í dag, áðrenn tað fór til prentingar. Men í samrøðuni, sum vit prenta í morgin, sigur hann, at løgmaður fór út um sínar heimildir og hann heldur, at tað er ófatiligt, at málið nú er snarað til, at tað er hann, sum er trupulleikin

